# Grunnur fyri Hotel Tórshavn settur á stovn



*Marner Jacobsen og Ingeborg Winther handaðu í gjár Kára Petersen, formanni í Trivnaðargrunninum fyri Sjúklingahotellið Tórshavn, tveir kekkar áljóðandi 185.768,81 tilsamans. Tilstaðar var eisini Ruth Egemose, fyristøðukvinna á Landssjúkrahúsinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Verkamannafylkingin endaði dagar sínar við at geva peningin, ið flokkurin átti, til Trivnaðargrunn fyri Sjúklingahotellið í Keypmannahavn*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í gjár handaði Ingeborg Winther Kára Petersen ein kekk áljóðandi góðar 85.000 krónur, sum skulu verða fyrsta stigið til at stovna ein sokallaðan trivnaðar-grunn til Sjúklinga-hotellið Tórshavn í Keypmannahavn. Føroya Sparikassi hevur gjørt av eisini at stuðla tiltakinum við einum peninga-ligum ískoyti**

TRIVNAÐAR-GRUNNUR
*Ingrid Bjarnastein*

Flokkurin Verkamannafylkingin við Ingeborg Winther á odda hevur verið óvirkin síðani seinasta løgtingsval. Flokkurin hevur nú alment rundað virksemi sítt av, og hava tey avgjørt at geva peningin, ið Verkamannafylkingin átti til eitthvørt vælgerandi endamál. Fundur varð hildin fyri umleið einum mánaða síðani, har tað síðani varð avgjørt, at peningurin skuldi fara til ein trivnaðargrunn fyri Sjúklingahotellið Tórshavn.

Upphæddin er í krónum og oyrum 85.768, 81. Hesin peningur skal millum annað brúkast til ein buss, sum sjúklingahotellið ætlar at keypa. Ætlanin er, at bussurin skal kunna brúkast til útferðir við sjúklingunum, soleiðis, at teir ikki sita inni alla tíðina, og so at teir á henda hátt fáa okkurt annað at tosa um enn bara sjúkur. Tað kann gerast ógvuliga troyttandi at sita inni á hotellinum í eitt longri tíðarskeið, og møguleikarnir í Danmark eru jú nógvir, nú brýr eru bæði yvir til Svøríkis og Fjón.

**Sparikassin stuðlar**

Føroya Sparikassi hevur avgjørt at stuðla hesum trivnaðargrunni.

– Eitt av aðalmálunum hjá Sparikassanum er jú at stuðla vælgerðandi endamálum, sigur Marner Jacobsen, forstjóri á Føroya Sparikassa.

Føroya Sparikassi hevur tí gjørt av, at lata grunninum 100.000 krónur, sum eisini skulu vera við til at fáa bussin til vega.

Nevndin fyri trivnaðargrunnin er eisini sett. Kári Petersen er formaður, meðan Dánjal Joensen frá Føroya Sparikassa og fyristøðukvinnan, Ruth Egemose, á sjúkrahúsinum, ið tekur sær av at senda sjúklingar til Ríkissjúkrahúsið, eru nevndarlimir. Eisini er ætlanin at stovna eina nevnd í Keypmannahavn, har Ina Fristad, leiðari á sjúklingahotellinum, skal vera formaður. Afturat sær skal hon so hava fólk, ið kunnu hjálpa henni við hugskotum. Bussurin er ikki tað einasta. Ætlanin er at skipa fyri øllum møguligum tiltøkum.

– Talan er bara um vantandi hugskot hjá teimum, ið stíla fyri, sigur Kári Petersen.

– Afturat hesum peningi, ið vit nú hava fingið, kundi eg annars væl hugsað mær, at privatpersónar kundu givið eina ávísa upphædd um mánaðan. Eg hugsi tó ikki um eina stóra pengaupphædd. Kanska eini 25 – 50 krónur um mánaðan, soleiðis at grunnurin fær ein fastan og javnan streym av peningi inn. Mangir løðir smáir gera stórar áir. Sjálvandi eru virkir og fyritøkur eisini vælkomin til at geva størri stuðul, sigur formaðurin í nýggja grunninum.



VIÐMERKINGAR

# Skúlabyggingin á Eiði



**Anfinnur Kruse, Jógvan K. Mørkøre, Jóhan Kalsoy**

Tíðliga í seinastu bygdaráðssetu kom frá skúlanum ynski um størri húsarrúmd. Talan var í fyrstuni um einar 3 skúlastovur. Høgligast var tá at byggja millum klettin og verandi skúla, men skjótt gjørdust hesar 3 skúlastovurnar til fleiri í tali og møguleikin fyri bygging ikki so einfaldur sum í fyrstuni.

Allir møguleikar kring skúlan vórðu troyttir. Tað endaði so við, at ein partur av bygdaráðnum helt, at best var at byggja vestan fyri verandi skúla, meðan ein annar partur vildi sleppa at byggja eystanfyri, við samanbygging sunnantil og eystantil á fimleikarhøllina.

Skitsuprojekt av hesum varð gjørt og sýndi ein bygning u.l. 707 m2 stóran, kostnaðurin helst 10 mill.

Teir sum hildu at best var at byggja vestanfyri tóku als ikki undir við byggingini eystanfyri, tí at ovlítið fekst fyri peningin og tí teir óttaðust fyri at samanbyggingarkostnaðurin fór at vera stórur og ónyttugur.

Nú byrjaði ein tung togan millum eystur og vestur. Í eysturpartinum vóru: Partur av bygdaráðnum, skúlanevndin, skúlafólkini og skúlamyndugleikarnir í Havn. Í vesturpartinum vóru 3 bygdaráðslimir.

Bygging vestanfyri bar við sær eina forðing fyri gamla dreyminum um innilokan av hondbóltsvøllinum, tí vóru góð ráð dýr. Bæði skúla og ítróttarhøll tóktist óhugsandi stórur biti at býta í, men tá ið neyðin er størst er hjálpin næst.

Um hetta mundi kom fram verkætlan til ítróttarhøll við síðubygningi í Hoyvík og á Strondum, krónutalið segðist at liggja niðanfyri 5 mill.

Tann eini av omanfyri nevndu 3 bygdaráðslimum, sum er byggimeistari, gjørdi ikki mætari enn at setast við tekniborði at evna til nevndu verkætlan, soleiðis at ein bygging vestanfyri skúlan á Eiði kundi bæði vera skúli og høll. 635 m2 skúli og 1770 m2 høll.

Var toganin tung áður, gjørdist hon dupult so tung nú, tað fall fólki fyri brósti at bygdaráðslimur skuldi setast við tekniborðið. So hart var togað at ætlanin mundi doyð í egginum, men væl grunda á galdandi lógir um skúlabygging slappst víðari.

Togað varð ymsar vegir t.d. var ætlan um græslíki á hondbóltsvøllin til krokkspæl, byggja uppí skúlan eystanfyri og so eina ítróttarhøll longri eysturi – alt meðan vestanmenninir hildu uppá sítt.

Um sama mundi fingu bygdaráðslimirnir bræv frá einum bygdaráðslimi har hann førdi fram, at skuldi Eiðis kommuna í holt við ítróttarhøll so var best fyri ítróttin og fyri bygdina at ein slík høll varð bygd suðuri í Sundalangum.

Hendan hugsanin fekk ikki nóg góða undirtøku í bygdaráðnum, meðan ætlanin um ítróttarhøll saman við skúlabyggingini á Eiði tá varð staðfest av 5 bygdaráðslimum. Bygginevnd varð sett og situr sama nevnd enn.

Toganin millum »eystur og vestur« fall tó ikki heilt burtur, men linkaði, alt meðan fyrireiking til skúla og ítróttarhøll helt fram eftir tí leisti, at skúlin skuldi víðkast, helst við einum ára byggitíð, og samstundis høllin innilokast til liðugtgerð so sum høvi beyðst. Skúlamyndugleikar og skúlafólk vóru nú við til at seta sín dám á innrættingina. Kostnaðarmetingin, sum var eitt innanhýsis arbeiðsskjal, av skúla og innilokaðari høll var sett til 9 mill. kr. v/netto MVG, henda metingin fevndi um:

• Tilfar sambært faktura, betongelementir, hiti, gólv til skúla og høll,
• El-arbeiði,
• Fundament, arbeiðsløn til innilokan og innrættan av skúla.

Og fevndi ikki um:

• Útgrevstur, planering, garð v.m. máling, gólválegging, innbúgv, ventilatión og samanbygging við verandi skúla.

Harafturat varð høllin bæði hækkað og breiðkað nakað, tískil er tað ein ring reingjan av veruleikanum at siga, at metingin kr. 9 mill. bleiv til yvir 15 mill. Sannleikin er tann, at metingin 9 mill. gjørdist til u.l. 9,1 mill.

### Viðmerkingar til okkurt av tí sum stóð í Sosialinum nr. 234

**Heldur bygt í Sundalagnum:**

a) Tað var barnaskúlin á Eiði, ið kravdi undirvísingarhølir.
b) Tað var ikki høll, málið snúði seg um.
c) Eiðisparturin í eini felagsbygging í Sundalagnum hevði sambært fólkatalinum verið 1/3.
d) Kostnaðurin uttan iva á hægri støði, cafeteria o.t.l.
e) Húsavørður ella –vørðar høvdu ikki kunna tikið sær av øðrum ognum í kommununi. Nú er kannska møguleiki fyri, at ein húsa- og hallarvørður kundi samskipast við ítróttarvenjara.
f) Samanumtikið einki bíligari, men pluss 10 mill. til skúlabygging á Eiði.
g) Bygdin hevur einki høli til størri borðhald og samkomur enn til 150 fólk.

**Ov lítið forarbeiði**

a) Júst tí er so nógv komið av skafti.
b) Longri forarbeiði hægri prísur – nevna eingi sammetingardømi við navni.

**Valár**

Tað reina tvætl, tað var jú tíðliga í setanini at alt byrjaði.

**Spell**

Spell at ikki øll duga at síggja hetta sum eitt bygdaprojekt, farið fram sambært galdandi lógum um skúlabygging og, við ávísari konsulenthjálp, hildið áfram soleiðis:

| | |
|---|---|
| Tekning | Eiði |
| Eftilit | Eiði |
| Jørð, betong, vatn og kloakk | Eiði |
| Kranaarbeiði og koyring | Eiði |
| Smíð | Eiði |
| Hiti, ventilatión og sanitet | Eiði |
| El-innleggjan | Eiði |
| Máling | Eiði |

Ein gyltur møguleiki hjá vinnufyritøkum í kommununi at bjóða seg fram at gera somu góðu og bíligu bygging aðrastaðni eisini.

Samanumtikið, bygningurin úti á Horni, 635 m2 skúli og 1770 m2 høll, hevur í dag, sammett við bygging aðra staðni í Føroyum, eitt virði uppá einar 30.000.000,00 kr.

Harafturat kann hann, um ynski verður um tað, lættliga geva møguleika fyri at húsa øðrum barnastovnum eisini. Tá kunnu uppaftur 4 mill. leggjast afturat virðinum.

Av tí at kommunan í mong ár hevur verið stýrd væl og »óprofessionelt« so megnar hon at gjalda hesa bygging kontant.

Eftir er so bara at ynskja at væl verður gingið um og at bygningurin verður fólkinum at gagni.

## Sjúkrasystramálið reist á tingi



*Kristian Magnussen vil hava Sámal Petur í Grund at greiða løgtinginum frá, hvat hann ætlar at gera, fyri at fáa sjúkrasystrarnar á B6 at taka uppsøgnirnar aftur*

**Sámal Petur i Grund skal á tingfundi í dag greiða tinginum frá, hvat hann ætlar at gera við málið um sjúkrasystrarnar á B6**

LANDSSJÚKRA-HÚSIÐ
*Eirikur Lindenskov*

– Hvørji ítøkilig stig ætlar landsstýrismaðurin at taka fyri at fáa sjúkrasystrarnar, ið arbeiða á B6 at taka uppsagnirnar aftur?

Hendan spurning fer Kristian Magnussen, løgtingsmaður Javnaðarfloksins, at seta Sámal Peturi í Grund, landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum á tingfundinum seinnapartin í dag.

Kristian Magnussen sigur tað verða eyðsæð, at okkurt er spinnandi galið við arbeiðsumstøðunum á B6, tá 18-19 sjúkrasystrar siga seg úr starvi í einum.

– Løgtingið kann sum játtandi myndugleiki ikki vera statistur, meðan ein heil heiliráðsdeild á okkara landssjúkrahúsi syndrast, heldur løgtingsmaðurin.

Umframt at vera ein vanlukka fyri deildina, sjúklingar og starvsfólk, so verður fylgjan eisini, at øktar byrðar verða lagdar á onnur á Landssjúkrahúsinum.

Kristian Magnussen heldur tí, at løgtingið má fáa ítøkiliga at vita frá landsstýrismanninum, hvat hann ætlar at gera fyri at fáa sjúkrasystrarnar at taka uppsagnirnar aftur.

## Moralsk og etisk menning

**TÍÐINDASKRIV**
*Bahá'í samfelagið*

Sunnudagin 9. des. var seminarið »Einstaklingurin og hin moralska menningin« hildið í Bahá'í miðstøðini í Tórshavn.

Hetta var fyrsta seminar í tiltakinum »Moralsk og etisk menning«, ið Bahá'í samfelagið skipar fyri. Ætlanin við hesum tiltaki er, at fólk kunnu koma saman at menna kunnleika, andaligt innlit og veruligar loysnir til hvussu vit kunnu hjálpa til við at skapa eitt umhvørvi hjá einstaklinginum, ungum sum gomlum, familjuni, skúlanum og samfelagnum sum heild, har dentur er lagdur á moralskan atburð og etiskt lívslag.

Fyrsta seminarið snúði seg um hvussu vit sum einstaklingar sjálv kunnu ávirka okkara moralska og etiska livihátt. Fyri tað mesta fevndi tað um bólkaarbeiði, har hugt varð eftir grundleggjandi tankum um hvat moralur og etikkur eru fyri nakað. Eisini varð prátað um hvussu moralur og etikkur ávirka gerandisdagin.

Tiltakið »Moralsk og etisk menning« heldur fram til januar-februar 2003. Í hesum tíðarskeiði verða aðalevnini einstaklingurin, síðani familjan, og at enda samfelagið sum heild. Serligur dentur verður lagdur á hvussu vit møguliga kunnu ávirka og stimbra moralskan og etiskan sið hjá ungdóminum.

Næsta seminarið verður í januar mánaði. Roynt verður at finna fram til veruligar loysnir á hvussu einstaklingurin kann liva eitt moralskt og etiskt lív í okkara samfelag. Hetta í eini tíð har fleiri hava trupult við at finna fram til hvat moralur og etikkur eru og kanska enn meir hvussu vit kunnu liva moralskt og etiskt, antin tað er í familjuni, arbeiðinum, skúlanum ella samfelagslívinum sum heild.